## Fiskikapping á Eiðisvatni

FISKIKAPPING
*tíðindaskriv*

Stuðulsfelagið hjá EB/Streymi hevur, síðan tað stovnanina í 2003, skipað fyri ymsum væleydnaðum tiltøkum, og fer nú fríggjadagin at royna seg við einum nýggjum tiltaki.

Fríggjakvøldið 8. juli verður nevnliga skipað fyri eini fiskikapping suðuri á Vatni, eisini kent sum á Eiðisvatni. Kappingin byrjar kl. 19.00 og heldur fram alla náttina og endar kl. 12 leygardagin 9. juli. Tá verða sílini vigað, og tann, sum hevur fingið tað tyngsta sílið, vinnur kappingina og fær steyp til ognar.

Kostnaðurin er 100 kr. fyri vaksin og 50 kr. fyri børn. Tilmeldingin fer fram við vatnið.

Ongum nýtist at ganga svangur, tí stuðulsfelagið fer at selja pylsur og smurt breyð. Bjargingarfelagið á Eiði fer at taka sær av trygdini. Tey, sum ikki longu eiga tráðu, nýtast ikki at sita heima, tí fiskiútgerð og agn fæst til keyps.

Hetta er eitt sera gott høvi hjá øllum at fáa eitt hugnaligt summarkvøld, saman við tráðuni og øðrum góðum fólki, í vakrari náttúru. Tjaldingarmøguleikar nir eru góðir.

Leygarkvøldið 9.juli verður dansur í EB-húsinum har Sólva og Bergmenn spæla. Her eru sjálvandi øll vælkomin.

Stuðlað tiltakinum hava: Svend Krosstein og Føroya Bjór.



*Tær tríggjar – vinstrumegin Malla Midjord, Unn Patursson og Ragnar Reinert - hava ikki havt langa tíð til at savna inn undirskriftirnar: Síðani fríggjadagin hava tær savnað inn 900 undirskriftir við eini áheitan um at tryggja teimum eldru heitan mat hvønn dag. Í morgun handaðu tær undirskriftirnar til Heðin Mortensen, borgarstjóra í Havn*

*Mynd: Bárður*

# 900 undirskriftir fyri teim eldru

**– Vit hava havt fundir við landsstýrismannin um málið. Men við eini so stórari uppbakking sum hesari, kunnu vit gera meiri. Nú er nokk tosað, nú má handlast so tey eldru kunnu fáa tann matin tey eiga at fáa, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn**

ELDRARØKT
*Snorri Brend*

Kl. 10:45 týsmorgunin fekk Heðin Mortensen nevniliga handaðar umleið 900 undirskriftir frá fólki sum biðja býráðið um at loysa trupulleikan við matútberingini.

- Vit ynskja trupulleikan loystan, soleiðis at tey gomlu kunnu fáa heitan mat hvønn dag, sigur Ragna Reinert, sum er ein teirra ið hevur tikið stig til hesa innsavningina.

Fyrrapartin vóru hon, Unn Patursson og Malla Midjord og handaðu undirskriftirnar, sum hava ligið frammi í handlum og aðrastaðni síðani fríggjadagin í farnu viku. Tað er ein bólkur frá røntgendeildini á Landssjúkrahúsinum, sum hevur tikið stig til hetta.

Fyri øll hesi 900 er tað so, at tá tað gongur út yvir menniskju, so má okkurt gerast.

### Fylgja við

Bæði Ragna og Heðin vóru bilsin um stóru undirtøkuna, sum hetta mótmælið hevur fingið. Og bæði vónaðu tey, at okkurt fór at henda í hesum málinum sum skjótast.

- Hetta er eitt tekin um at fólk fylgja væl við í tí, sum hendir í samfelagnum, og gera nakað, tá slíkar sparingar raka ein ávísan bólk.

- Vit ætla so ikki at sita hendur í favn. Nú má okkurt henda, segði Heðin Mortensen, tá hann fekk handað hesar undirskriftirnar.

Fundir hava verið við landsstýrismannin í almannamálum, Hans Paula Strøm, um málið. Og nú ætlar Heðin sær so aftur á fund við Hans Paula, so hetta málið kann verða loyst sum skjótast.

Og málið hevur veruliga skund, tí útberingin av matinum steðgaði eftir ætlan mikudagin.

# Færri mjólkarframleiðarar – men fleiri litrar

**Fyri trimum árum síðan høvdu vit 69 mjólkarframleiðarar í Føroyum, sum lótu mjólk til MBM. Í dag eru bøndurnir 14 færri, men samlaða talið av litrum er størri enn áður**

MJÓLKARFRAMLEIÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Við endan av árinum 2001 vóru tilsamans 69 mjólkarbøndur í Føroyum, sum lótu mjólk til MBM, Meginfelag Búnaðarmanna. Innvigingin av mjólk hetta árið var 7.032.763 litrar.

Eitt ár seinni – við endan av 2002 – var talið av mjólkarframleiðarum tað sama, men innvigingin var størri, 7.490.222 litrar.

Við ársenda 2003 høvdu vit tveir bøndur færri enn í 2002, og talið av litrum var umleið millum tølini í 2001 og 2002.

### Eykagjald

Í 2003 fór Meginfelag Búnaðarmanna undir at lata eyka gjald fyri fyrstafloksmjólk. Av teimum inn-vigaðu litrunum hetta árið vóru 92,1% fyrstafloks mjólk – ella 6.694.849 litrar.

Við ársenda í fjør – 2004 – vóru tilsamans 57 mjólkarbøndur, sum lótu mjólk til MBF, og innvigingin hetta árið var 7.580.985 litrar, sum er tað mesta hesi árini.

Av samlaða litratalinum í 2004 vóru 89,1% fyrstafloksmjólk, sum svarar til 6.764.717 litrar.

MBM veit í blaðnum, Bústólpi, at siga, at í løtuni eru 55 mjólkarframleiðarar í Føroyum, sum er 14 færri enn við ársenda 2001.

### Selja kvotur

Í grein í Bústólpa, vísir formaðurin í Meginfelag Búnaðarmanna, Poul Klementsen á, at mjólkarkvoturnar gjørdust søluligar fyri einum ári síðan.

- Eitt sindur misjavnt var, hvussu kvinnur og menn tóku ímóti hesum, men flestu vóru fegin um hetta. Onkur helt tó, at bíðað skuldi verið í eitt ár aftrat, áðrenn kvoturnar gjørdust søluligar.

Hann sigur, at hetta er so fyrstu ferð, at bóndin hevur eitt virði at halda seg til – og sum marknaðurin hevur verið higartil, hevur prísurin verið góður.

- Nú kunnu vit fara til ein fíggingarstovn við einum virði at seta í veð fyri eitt nú kvotukeyp, tí nú verður loyvt at seta í pant.

Poul Klementsen vísir á, at bóndin nú við øðrum orðum sjálvur fær loyvi at avgera, um hann setur kvotuna í pant – ella, hvat hann setir hana í pant fyri.